## Bumba framvegis Taliban

Forsetin í Afghanistan, Hamid Karzai, vil vera við, at 130 sivilfólk doyðu í amerikonskum loftálopum í Afghanistan í síðstu viku, og so nógv sivilfólk eru ikki deyð í bardøgunum har síðani innrásina í 2001. Men tað fær ikki amerikanararnar at gevast við at søkja at málum hjá Taliban. James Jones, sum er trygdarráðgevi hjá Barrack Obama, forseta, sigur, at USA vil hava leysar teymar í bardaganum við Taliban. Jemes Jones sigur tó, at USA fer at kanna, hvørja ávirkan bumbuálopini hava, og tí fer David Petraeus, generalur, til Afghanistan at kanna viðurskiftini.



## Skutu eftir sivilfólki

Uppreistrarherurin í Sri Lanka, Teir Tamilsku Tikararnir, leggja stjórnarherin undir at hava beint fyri meiri enn 2.000 sivilfólkum í einum kanónálopi leygarkvøldið. Á heimasíðuni skriva uppreistrarmenninir, at herurin valdi at søkja at um vikuskiftið, tí tá er eygað hjá altkjóða fjølmiðlunum ikki so vakið sum hinar dagarnar í vikuni. Stjórnin í Colombo avsannar tíðindini og heldur uppá, at herurin brúkar ikki kanónir og onnur tung vápn í bardaganum við uppreistrarmenninar, tí so mong sivilfólk eru í stríðsøkinum.

# Húsahandlarnir helvtaðir

**Serstakliga fá hús eru handlaði seinastu tíðina, og í Suðurstreymi ber nú av, tí bara 11 hús eru handlaði allan fyrsta ársfjórðing í mun til 21 sama tíðarskeið í fjør. Eisini á bygd eru munandi færri handlar og húsprísurin er fallin við 25 prosentum, í mun til sama tíðarskeið í fjør. – prísfallið skal takast við ávísum fyrivarni, tí tað er stórur munur á húsum, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Eik**

SETHÚS
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Síðan fíggjarkreppan byrjaði hevur sethúsamarknaðurin staðið mestsum stillur. Serstakliga fá hús eru handlaði seinasta hálva árið, og í mun til undanfarin ár, stendur sethúsamarknaðurin næstan stillur, sambært tølum, sum Eik leggur fram, frá upplýsingum hjá Skráseting Føroya.

Fyrsta ársfjórðing í fjør vórðu 21 hús handlaði í høvuðsstaðnum, meðan tað í ár bara eru 11, so talið er næstan helvtað.

Á bygd er eisini eitt stórt fall í húsasølunum, tí gongdin er tann sama á bygd sum í høvuðsstaðnum, um vit samanbera 1. ársfjórðing 2008 við 1. ársfjórðing 2009.

Seinast so fá hús vórðu handlað var í 2004.



*Sambært tølum, sum Eik hevur útgreinað frá tølum hjá Skráseting Føroya, eru handlarnir við húsum næstan helvtaðir, um vit samanbera fyrsta ársfjórðing í ár við sama tíðarskeið í fjør*

### Bygdaprísir falnir

Flestu handlarnir, eru handlar á bygd, har miðalhúsaprísurin er um helvtina av prísinum í høvuðsstaðnum.

Tað, sum merkir handlarnar á bygd, um sammet verður við 1. ársfjórðing í fjør, er, at prísurin fyrsta ársfjórðing í ár hevur háttað sær, sum tey flestu høvdu væntað, tí prísurin í størri bygdunum er minkaður einum fjórðingi seinasta árið, so vit kunnu siga, at húsini í størri bygdum, sum fyri einum ári síðan kostaðu eina millión, í dag kosta 750.000 krónur.

Í smærru bygdunum eru prísirnir eisini falnir eitt sindur, meðan minsta prísfallið hevur verið í høvuðsstaðnum.

- Tá hugt verður at miðalprísum yvir sethúsasølur, so skal tað takast við stórum fyrivarni, tí tað verður roknað út eftir prísinum tilsamans, býtt við talið av handlum, og onkuntíð verða stór hús handlaði og onkuntíð verða smá hús handlað.

Hartil kann nevnast, at hjá Inni hava tey ikki merkt so stórt prísfall á bygd, sum tølini vísa, greiðir Bjarni Olsen, stjóri í Eik, frá.

Hann greiðir somuleiðis frá, at hann ikki væntar, at prísirnir fara at falla so øgiliga nógv, um búskapargongdin ikki versnar. Men hinvegin kunnu vit rokna við, at prísirnir falla eitt sindur meira, um búskaparliga gongdin versnar.

### Prísurin ikki avgerandi

Tó er Bjarni Olsen sannførdur um, at ein lækking av prísunum á sethúsunum ikki er ein garrantur fyri fleiri handlum og styttri sølulistum.

- Fólk eru rættiliga varin í løtuni, og vilja ikki gera ov nógvar stórar íløgur. Tað merkja vit eisini í eftirspurninginum eftir lánum, so eg meti, at ótryggleikin um búskapargongdina heldur talinum av handlum niðri, sigur Bjarni Olsen.

# Allan Dalsgarð sagt seg úr starvi

**Eftir átta mánaðir sum miðlaleiðari hjá Kringvarpi Føroya, hevur Allan Dalsgarð nú sagt seg úr starvi**

KRINGVARP
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Fríggjadagin váttaði Allan Dalsgarð fyri Portalinum, at hann hevur sagt seg út starvi í Kringvarpinum.

Um orsøkina sigur hann seg hava fingið annað, og fyri seg, meira áhugavert starv. Tó vil hann ikki siga, hvat starv talan er um. Síðan bygnaðarbroytingarnar í Kringvarpinum hevur almikið rumbul verið um stovnin. Ikki minst um fíggjarliga grundarlagið undir stovninum, har Kringvarpið hevur otað seg alt nærri lýsingarmarknaðinum og avmarkaða lýsingartilfeinginum, sum privatu miðlarnir vanliga stíðast um sínamillum.

Í vikuni visti Dimmalætting at siga, at miðlaleiðarin í Kringvarpinum, Allan Dalsgarð, hevði fingið sess í nevndini hjá privatu lýsingarfyritøkuni Sendistovuni. Og hósdagin kravdu tíðindafólkini á tíðindadeildini hjá Kringvarpinum, at Allan Dalsgarð fór úr nevndini aftur fyri á tann hátt at endurreisa mista trúvirðið á stovninum.

Eitt annað mál, sum ivaleyst ikki hevur gjørt tað so hugaligt at virka sum miðlaleiðari í Kringvarpinum hevur verið leikluturin sum skrásleggjari. Millum annað skapti avtøkan av morgunlestrinum fyrrapart stóra ónøgd millum fólk.

# Vika um orku endaði við ORKU

**Umvørvisvikan hjá Tórshavnar kommunu endaði leygarkvøldið. Evnið í vikuni var orka, og ORKA slapp eisini at enda vikuna á grønari konsert, sum varð fyriskipað, fyri at fáa tey ungu við.**
**- Vit valdu at branda vikuna við eini konsert, tí ungdómarnir kenna bara vikuna frá at skula rudda, sigur Petur Háberg, samskipari**

KONSERT
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri at seta punktum á umhvørvisvikuna hjá Tórshavnar kommunu við einum braki, varð skipað fyri eini stórari konsert leygardagin, sum minti mest um ein lítlan festival.

Heili seks nøvn vóru á skránni, og bólkarnir vóru millum mest aktuellu bólkarnir.

- Vit valdu bólkarnar eftir, at teir flestu eru fløguaktuellir, meðan Orka var upplagt fyri at enda eina viku um orku. Og tað er so langt síðani vit hava hoyrt Lenu og Niklas, og tí hildu vit tað vera stuttligt at hava tey við, greiðir Petur Háberg frá.

Somuleiðis greiðir hann frá, at tey valdu at raka breitt, heldur enn at taka Ineptus ella 200. Umframt, at Petur Háberg, sum valdi bólkarnar, royndi at gera soleiðis, at stuðulskonsertin, sum var í Norðurlandahúsinum, og grøna konsertin ikki skuldu hava somu bólkar.

### Flutt innandura

Ætlanin var at konsertin skuldi vera uttandura, men tá til stykkis kom, tordu fyriskipararnir ikki at hava hana uttandura, tí so umskiftandi veður hevur verið seinastu vikuna.

- Tað var kanska eitt sindur keðiligt, at vit fluttu hana innandura, tí veðrið var ikki so galið, men tað onki er so keðiligt sum at vera til eina konsert, har mann bara hugsar um, hvussu kaldur mann er, heldur enn at lurta at tónleikinum, men leygardagurin var fyrstu ferð í lívinum, at eg vónaði, at tað fór at regna, sigur Petur Háberg.

So fyriskipararnir tóku tryggu loysnin, og fluttu konsertina innandura.

### 300 fólk

Tað vóru eini 300 fólk til ókeypis konsertina, sum Tórshavnar kommuna rindaði fyri, men hóast talið ikki var so stórt, so er Petur Háberg glaður fyri, at tað ikki komu fleiri.

- Vit vóru eitt sindur bangin fyri, at vit ikki høvdu lýst nakað serligt fyri konsertini, men høvdu tað verið fleiri fólk, so høvdu tey ikki sloppið inn í Tjóðpallin, tá Orka spældi, sigur Petur Háberg.

Hann metir somuleiðis, at Tjóðpallurin er ein hin besti pallurin í landinum til konsertir.

### Fyri tey ungu

Hóast fólkini, sum komu at lýða á ymisku bólkarnar á grønu konsertini, vóru í ymiskum aldri, so var høvuðsendamálið við konsertini at geva teimum ungu eina fatan av, at umhvørvisvika, ikki bara er, at mann skal út at rudda.

- Vit valdu at branda vikuna við eini konsert, tí ungdómarnir kenna bara vikuna frá at skula rudda, sigur Petur Háberg, samskipari.

Konsertin var frá klokkan 16 til klokkan var farin av hálvgum ellivu leygarkvøldið. Enn er ikki greitt, um tílíkar grønar konsertir vera eitt afturvendandi tiltak.